## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Ein loyalur arbeiðsformaður gevst



Rodmundur Nielsen, býráðsformaður, handaði m.a. blómur og ein málning til André Hentze
Mynd: Maria Olsen



*Rodmundur Nielsen heldur røðu, meðan André og konan, Marjun, lýða á*
Mynd: Maria Olsen



*Nógv fólk og fyrrverandi starvsfelagar stukku inn á gólvið*
Mynd: Maria Olsen



*Hans J. Lamhauge, formaður í teknisku nevnd, hevur samstarvað við André í 27 ár*
Mynd: Maria Olsen

**Seinasta fríggjadag var móttøka í býráðshøllini hjá Runavíkar kommunu, har kommunan heiðraði eitt av starvsfólkunum seinastu mongu árini fyri trúgva tænastu. Maðurin, sum var miðdepilin hendan dagin, var Andre Hentze, ið hevur starvast sum formaðurin hjá kommununi í sløk 29 ár**

### MÓTTØKA

*Anna Joensen, praktiknæmingur*

Á samkomuni, har fleiri býráðslimir og onnur vóru møtt, var kaffi og pinnamatur. Áðrenn løtan byrjaði við heilsanum til Andre, spældi Meinhard Bjartalíð á klaver, og hetta setti sín serstaka dám á tiltakið.

Fystur at taka orðið var býráðsformaðurin, Rodmundur Nielsen, sum takkaði Andre fyri trúgva tænastu øll hesi mongu ár.

Hann vísti á, at tað er ikki ein og hvør, sum hevur sitið í almennum starvi eitt so langt áramál.

- Teir, sum sótu í kommununi, tá ið Andre tók við starvinum, eru ikki allir á lívi í dag. Formaður í Runavíkar kommunu fyri 29 árum síðan var Dia P. Johannesen.

Rodmundur takkaði Andre fyri loyalitet og góð samstarvsevni, sum hava so stóran týdning í einum tílíkum starvi.

- Andre tók sjálvur avgerðina um at gevast, og nú hann ikki longur er í starvi hjá kommununi, er hann farin at bora og spreingja saman við soninum, Jákupi Andreas.

Rodmundur vísti á, at Andre er aktivur í samkomu, har hann hevur serliga stóran áhuga fyri ungdóminum.

- Hesum hava vit størstu virðing fyri, segði hann.

Býráðsformaðurin ynskti fyrrverandi arbeiðsformanninum og familju hansara alt tað besta, nú hann er farin undir annað virksemi.

Á samkomuni handaði Rodmundur Nielsen Andre ein frálíkan málning av Sandi, haðani Andre er. Listamálarin er leirvíkingurin, Sámal Toftanes.

Hans Jakku Lamhauge, sum hevur verið formaður í teknisku nevnd hjá Runavíkar kommunu í mong ár, takkaði eisini Andre fyri trúgva tænastu øll hesi mongu ár.

- Vit hava samstarvað í 27 ár, og tískil kenni eg teg rættiliga væl. Tú hevur verið ótrúliga loyalur móti tínum arbeiðsplássi. Tú torir at siga tína meinig, og tú sigur hana við rætta viðkomandi.

Hans Jakku vísti á, at tað krevur nóg av einum manni at vera arbeiðsformaður í eini so stórari og umfatandi kommunu við so nógvum bygdum.

- Tað krevur nógv at fáa alt at ganga upp.

Hans Jakku greiddu frá umstøðunum, sum arbeiðsmenninir hjá kommununi í sínari tíð høvdu uppi á einum neystalofti og seinni í kjallaranum á havnaskrivstovuni.

- Tú ynskti alla tíðina, at arbeiðsmenninir fingu rímilig kor at virka undir. Nú tú fert frá, eru hesar umstøður við at verða undir landi í nýggjum bygningi á Lambareiði.

Hans Jakku segði, at tað ikki altíð hevur verið so tespiligt hjá Andre og hansara monnum í kommununi.

- Tit noyddust út at arbeiða í regni og ódn, tá ið rennurnar ikki svølgdu - ja, onkuntíð svóvu tit ikki í heilar nætur. Eg havi stóra virðing fyri tí arbeiði, tú og tínir menn hava gjørt fyri kommununa.

Eliesar Kastalag, ið hevur starvast sum verkfrøðingur hjá kommununi í mong ár, segði eisini nøkur orð á hugnaligu móttøkuni.

Hann takkaði Andre fyri mongu árini og vísti á hansara loyalitet móti arbeiðsplássinum.

- Eg byrjaði í 1970, einsamallur á deildini sum arbeiðsformaður, tekniskur ráðgevi og alt millum himmal og jørð.

Eliesar segði seg minnast ógvuliga væl, tá ið hann í sínari tíð sá umsóknina hjá Andre, tí teir kendust úr Klaksvíkini.

- Eg var ógvuliga glaður fyri setanina av honum. Samstarvið hevur verið gott, hóast vit ikki altíð hava verið samdir um alt.

Eliesar helt, at kona Andre, Marjun, mangan hevur verið tolin, tá ið arbeiðsdagarnir vóru langir, og neyðugt var hjá honum at traðka til í úrtíð.

- Hjartaliga takk fyri tíðina, segði Eliesar.

Kári P. Højgaard, býráðslimur, takkaði Andre eisini fyri tíðina og endurtók enn einaferð hansara loyalitet móti arbeiðsplássinum.

- Tað hevur ikki altíð verið lætt at gjørt øllum til vildar, eitt nú tá ið kavi lá, og vegirnir skuldu gravast.

Kári vónaði, at Andre fer at fáa mong góð ár aftrat.

- Aldur sæst ikki á honum, segði hann.

At enda takkaði Andre Hentze fyri tøkkirnar og góðynskini.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



*Fráfarandi aðalskrivarin, Ásbjørn Jacobsen, og nýggi aðalskrivarin, Jaspur Langgaard*
Mynd: Kristian á Reynatrøð

### Dagurin

**14. januar. Felix**, deyður umleið ár 260. Prestur í Nola, nærhendis Napoli í Italiu. Nógvar eru frásagnirnar um hansara lítillátna lív og tær mongu undurgerðir, hann útinti.

Navnið merkir *eydnuríkur*.

# Blái Krossur Føroya nýggjan aðalskrivara

**Fríggjadagin 9. januar var almenn móttøka á skrivstovuni hjá Bláa Krossi Føroya á Glyvrum í sambandi við at aðalskrivarin seinastu átta árini, Ásbjørn Jacobsen, hevur lagt frá sær, og Jaspur Langgaard á Nesi hevur tikið við sum nýggjur aðalskrivari**

Eini 100 fólk vóru til móttøkuna og nøkur teirra hildu talu, tey vóru m. a. nevndarformaðurin Sverri Steinhólm, fráfarandi aðalskrivarin Ásbjørn Jacobsen, nýggi aðalskrivarin Jaspur Langgaard, landsstýrismaðurin í heilsumálum Bill Justinussen og løgtingslimurin Alfred Olsen.

Nýggi aðalskrivarin, Jaspur Langgaard, er 33 ára gamal og leirvíkingur. Eftir lokið studentsprógv fór hann í 1990 til Danmarkar at lesa til datamatikara.

Stutt eftir at hann var heimafturkomin fekk hann starv sum edv-maður á Formula í Havn og har hevur hann verið í starvi seinastu 9 árini. Tó arbeiddi hann í 2000 sum KT-leiðari á Almannastovuni.

Jaspur er giftur við Oliviu, f. Olsen, í Rituvík og tey eiga synirnar Remi, 12 ár og Beinir, 4 ár.

Blái Krossur Føroya er ein privatur hjálparfelagsskapur, ið umboðar 1100 limir í 8 lokalfeløgum. Á skrivstovuni á Glyvrum arbeiða 3 fólk, á Blákrosskaféini í Havn arbeiða 2 fólk, á Blákrossheiminum eru 12 ársverk og uml. 60 kvinnur arbeiða sjálvboðið í Blákrossbúðini.

Endamálsgreinin hjá Bláa Krossi Føroya kann býtast upp í trý:

1. Hjálpartænastan, sum er at hjálpa menniskjum, ið eru illa fyri vegna misnýtslu av rúsdrekka ella rúsevnum.
2. Fyribyrgingararbeiði, har roynt verður at fyribyrgja at fólk misnýta rúsdrekka og onnur rúsandi evni, og at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi.
3. At boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.

Jaspur sigur, at hann kundi hugsað sær at økt um limatali í Bláa Krossi og at gjørt meira burturúr fyribyrgingararbeiðinum. Í tí sambandi kundi hann hugsað sær, at almennu myndugleikarnir settu meira pening av til fyribyrgingararbeiði á løgtingsfíggjarlógini m.a. til fyribyrgingarátakið hjá Bláa Krossi "Børn í vanda", sum hevur til endamáls at veita børnum góðan og tryggan uppvøkstur.



*Alfred Olsen og Kári Højgaard, løgtingsmenn*
Mynd: Kristian á Reynatrøð



*Jaspur Langgaard og Edmund Joensen, løgtingsformaður*
Mynd: Kristian á Reynatrøð



*Fyrrverandi og núverandi leiðarar á Blákrossheiminum, Sólborg Dulavík, og Olga Magnussen*
Mynd: Kristian á Reynatrøð

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá okkara kæri

**Óli Hansen**
vanliga nevndur Óli í Sundunum,
Kollafjørður

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til prestarnar Hera Joensen
og Ingu PoulsenDam.
Tøkk til sangarar og berarar.
Tøkk til stýrið fyri missiónshúsið fyri vælvild
í sambandi við jarðarferðina.
Tøkk fyri blómur og kransar og til øll tykkum,
ið á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina,
bæði áðrenn og aftaná,
og til tykkum, ið fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Marin og systkini: Kirstin, Hans, Maria, Hans Jacob, Poul Eli, Johannes og Anton**

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu,
tá góði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Effer millum Garðarnar**
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk øll tit, sum hjálptu so væl til við jarðarferðina.
Tøkk fyri blómur, kransar, uppringingar innan-
og uttanlands, heilsanir og vitjanir í heiminum
áðrenn og aftaná jarðarferðina.
Tøkk øll tit, sum fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Etly, Kári, Benn Johnny og Estrid við familju**